# Vandin fyri nýggja Smyrli er minkaður

**Vandin fyri, at nýggja Suðuroyarskipið hjá Stranderðsluni verður lagt við bryggju, tá ið tað kemur til landið í heyst, er nú minkaður eitt sindur**

SEMJA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Samráðingar um nýggja Smyril skulu byrja fyrst í mai og fæst ikki semja, kunnu allir sáttmálarnir sigast upp*

Nú er vandi fyri, at nýggi Smyril verður lagdur, tá ið hann kemur, minkaður.

Í hvussu so er eitt sindur!

Tað er greitt, eftir at Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið gjørdi eina semju klokkan sjey í gjáramorgunin.

Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið settust longu á miðdegi fríggjadagin at samráðast saman við semingsmonnunum at samráðast um nýggjan sáttmála fyri teir maskinmeistarar, sum arbeiða hjá tí almenna. Tað vil siga teimum, sum sigla við Strandferðsluni og Magnus Heinasyndi og teimum, sum arbeiða á sjúkrahúsum og á øðrum almennum stovnum á landi.

Sostatt tók tað meiri enn hálvtfjórða samdøgur at koma til eina semju.

Og størsti trupulleikin var júst nýggja Suðuroyarskipið.

Fíggjarmálaráðið setti uppá, at nýggi sáttmálin skuldi eisini fevna um nýggja Smyril fyri at forða fyri, at hann fekk somu lagnu sum bæði nýggi Teistin og Brimil, sum báðir lógu í fleiri vikur, eftir at teir vóru liðugur, tí semja fekst ikki um lønina hjá summum av teimum, sum skuldu sigla við.

Hinvegin tvíhelt Maskinmeistarafelagið um at nýggi Smyril skuldi ikki vera við í hesum sáttmálanum. Felagið segði, at nýggi Smyril var ikki við í upprunakrøvunum hjá fíggjarmálaráðnum og tí kundi hann ikki takast við. Felagið segði eisini, at ongin veit enn, hvussu hann skal mannast og tí ber ikki til at gera sáttmála um hann enn. Hetta var størsta forðingin at koma um og tað mesta av hesum yvir 90 tímunum, sum samráðingarnar vardu, fóru við at partarnir lógu í hvør sínari skotgrøv og togaðust um nýggja Smyrli.

### Funnu eina millumloysn

Tað endaði so við, at semingsmenninir tíðliga í gjáramorgunin løgdu eitt semingsuppskot fyri partarnar við eini salomonskari loysn í. Og tað, sum semingsmenninir skutu upp, var, at bíða við samráðingunum um nýggja Smyril. Men samráðingarnar um nýggja Smyril skulu byrja so skjótt tað er greitt, hvussu hann skal mannast.

Og tað skal vera greitt fyrst í mai.

Semjast partarnir ikki um lønina hjá teimum, sum skulu sigla við nýggja Smyrli, kunnu allir sáttmálarnir um maskinmeistararnir hjá tí almenna, sum samráðingarnar hava verið um á hesum sinni, sigast uppaftur. Sostatt kunnu sáttmálarnir um maskinmeistararnir hjá Strandferðsluni, teir við Magnusi Heinasyni og teir á sjúkrahúsum og á øðrum almennum stovnum á landi, sigast uppaftur við einum mánaða ávaring.

Teir kunnu tó í fyrsta lagi sigast uppaftur fyrsta september.

Fíggjarmálaráðið sigur, at sostatt bendir nógv á, at sáttmálaviðurskiftini í sambandi við nýggja Smyril kunnu avgreiðast í nóg góðari tíð.

Maskinmeistarafelagið sigur, at teir hava alla tíðina verið greiðir yvir, at avtala skal gerast um nýggja Smyril, men tað kann bara ikki gerast nú.

Maskinmeistararnir eru kortini fúsir at fara aftur til samráðingar, tá ið manningarskjølini eru klár fyrst í mai.

Jógvan Nybo, formaður í maskinmeistarafelagnum, heldur ikki, at hetta bara er at útseta pínuna, tí tað er ásett, at samráðingarnar um nýggja Smyril skulu byrja fyrst í mai og miseydnast tær, kunnu allir sáttmálarnir sigast upp aftur.

Annars eru sáttmálarnir, sum vórðu undirskrivaðir í gjáramorgunin innan fyri lønarkarmin upp á eini níggju prosent í tvey ár.

Ein partur av lønarhækkingini fer til eftirløn, og onkrar umflokkingar verða gjørdar. Harumframt eru maskinmeistarar á landi fevndir av sættu feriuvikuni, og arbeiðstíðin hjá teimum er sett til 39 tímar um vikuna.

Somuleiðis er avtalan um førleikamenning er galdandi fyri allar tríggjar sáttmálarnar.

# Jana vann við stórum meiriluta

**Forkvinnan í felagnum fyri sjúkrarøktarfrøðingar varð afturvald við stórum meiriluta**

AÐALFUNDUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Jonna Hansen, Hervør Eidesgaard, næstforkvinna, Anna Maria Simonsen, Joan Ziskasson, Jana H. Dalsgaard, forkvinna, Einar Klakkstein og Elsa Vest*
*Maria Debes, nevndarlimir og tiltakslimirnir, Turið Zachariasen og Katrin Jønsson, eru ikki við á myndini*

Forkvinnan í felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar eitur eisini Jana H. Dalsgaard tey næstu trý árini.

Tað er greitt eftir aðalfundin í felagnum leygardagin.

Á aðalfundinum vóru einir 100 av teimum 800 limunum í felagnum møttir og har varð úrslitið av nevndarvalinum kunngjørd.

Í felagnum fyri sjúkrarøktarfrøðingar, fer nevndarvalið fram við frumatkvøðu ímillum limirnar undan aðalfundinum og so verður úrslitið kunngjørt á sjálvum aðalfundinum.

Ein ávísur spenningur var um valið, tí hesuferð hevði Ana Reinert í Havn bjóðað Janu H. Dalsgaard av í valinum um forkvinnuna.

Men tá ið avtornaði var engin ivi um, hvør skuldi vera forkvinna í felagnum : Jana H. Dalsgaard varð nevniliga afturvald við stórum meirluta. Hon fekk yvir 300 atkvøður. Tað er meiri enn tvær ferðir so nógvar atkvøður sum mótvalevnið fekk, tí hon slakar hálvtannaðhundrað atkvøður.

Annars eru nevndarlimir í felagnum hesir: Anna Maria Simonsen í Tórshavn er afturvald, Jonna Hansen í Vestmanna er nývald, Maria Debes í Tórshavn er nývald, Joan Ziskason í Tórshavn er eisini nývald, Hervør Eidesgaard á Tvøroyri, afturvald og Elsa Vest á Sandi, aftuvald.

Tiltakslimir eru Einar Klakkstein í Klaksvík, sum er nývaldur, Turið Zachariasen í Hvannasundi og Katrin Jønsson í Nesi í Eysturoy.

Annars hevur nevndin afturvalt Hervør Eidesgaard til næstforkvinnu. Hon hevur verið nevndarlimur í felagnum hesi seinastu 12 árini.

Nøkur vóru eisini, sum ikki stillaðu uppaftur til nevndarval hesuferð. Tær vóru Óluva Nónstein í Tórshavn, Anna Jóanesardóttir úr Tórshavn og Ana Reinert í Havn, sum ístaðin stillaði upp til forkvinnu.

### Nýggjur sáttmáli

Annars hava felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið eisini gjørt sáttmála um ein nýggjan tvey ára sáttmála fyri sjúkrarøktarfrøðingar.

Eftir sáttmálanum, sum varð undirskrivaður í farnu viku, hækkar lønin tilsamans umleið 9% hesi bæði næstu árini.

Í sáttmálanum hava partarnir gjørt eina avtalu um serstakar frídagar. Eftir hesi avtaluni, kunnu starvsfólk vinna sær ein eyka fríviku. Men tey, sum ikki vilja hava frívikuna, kunnu í staðin fyri lønina útgoldnað Samstundis hava partarnir gjørt avtalu um støðugt at menna førleikan hjá sjúkrarøktarfrøðingum

– Skulu uppgávurnar hjá stovnum landsins verða røktar á munadyggan hátt við neyðugari dygd og framhaldandi menning, er sera týðandi, at førleikarnir hjá starvsfólkunum verða áhaldandi røktir og mentir - bæði í dagliga arbeiðnum og við eftirútbúgving og víðari útbúging, stendur í avtaluni um førleikamenning.



# Undirtøka fyri kvinnulistanum

**Á fundi um at gera ein kvinnulista til býráðsvalið í Havn vórðu bólkar settir til at arbeiða víðari við málinum, og ein nýggjur fundur er somuleiðis avtalaður. Undirtøkan millum luttakararnar letst at vera góð, sigur Annika Sølvará, ein av luttakarunum**



Fundur var í Havn mánakvøldið um at gera ein kvinnulista. Annika Sølvará var ein av luttakunum, og hon sigur, at undirtøkan fyri einum kvinnulista til býráðsvalið í Havn er stór

KVINNULISTI

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Í blaðnum í gjár stóð grein um, at ein kvinnufelagsskapur hevur tikið stig til at gera ein kvinnulista til býráðsvalið í Havn. Sigast skal beinanvegin, at tað ikki er rætt, at tað er ein felagsskapur, sum hevur tikið stig til hetta, men heldur er talan um nakrar einstakar kvinnur, sum vóru vónbrotnar av úrslitinum av løgtingsvalinum tann 20. januar. Og tí hava hesar fundast og tosað um at gera ein kvinnulista í eina tíð.

Og mánakvøldið var so aftur ein fundur, har fitt av kvinnum vóru møttar. Annika Sølvará var ein av luttakarunum á fundinum, og hon sigur, at flestu kvinnurnar tóku undir við hesum.

– Huglagið var so avgjørt positivt á fundinum, og flest allar vóru við upp á at gera ein kvinnulista, greiðir hon frá.

– Áhugi er fyri einum kvinnulista, tað er ongin ivi um tað, sigur Annika Sølvará.

Tað er heldur ongin ivi um, at Annika sjálv heldur hetta við einum kvinnulista til býráðsvalið vera eitt frálíkt hugskot, og leggur hon afturat, at um kvinnulistin verður veruleiki, og hann ger stóra nyttu, so er vónin, at tað fer at smitta av til løgtingsval framyvir.

### Styggir ikki

Ein vansi, sum verður nevndur í hesum sambandinum er, at ein kvinnulisti fer at taka atkvøður frá teimum kvinnunum, sum eru uppstillaðar á flokslistum, men hetta er Annika Sølvará als ikki samd í.

Hon heldur tvørturímóti, at talan kundi verðið um eina øking í samlaða atkvøðutalinum til kvinnur, um ein kvinnulisti bleiv.

– Eg kundi ímyndað mær, at eitt samstarv millum ein kvinnulista og tær kvinnurnar, sum eru uppstillaðar á einum flokslista heldur, sigur hon.

Annika heldur ikki, at hetta við at seta so nógv fokus á kvinnur og val, kann fara at bíta seg sjálvt í halan við, at tað møguliga styggir veljararnar.

– Eg trúgvi ikki, at tað fer at styggja nakran, tað má vera upp til ein sjálvan, um ein velur kvinnu ella mann. Men tað er onki at aftra seg í, at kvinnur sjáldan eru fyrstvaldar á einum flokslista, staðfestir Annika.

Hetta heldur hon kann koma av, at fólk hugsa sum so, at tað verður ikki ein kvinna, sum verður vald, og tí velja tey ein mann. Og tí kann sleppast undan við einum reinum kvinnulista, sigur hon.

Sum sagt er undirtøka millum kvinnur fyri at gera ein kvinnulista. Bólkar fara nú at arbeiða víðari við málinum og nýggjur fundur er avtalaður. So óivað verður meira at hoyra til hendan listan framyvir.

# Jógvan Purkhús í Klaksvík

Í døgunum 3. til 10. apríl hevur Jógvan Purkhús myndaframsýning í hølunum hjá Føroya Banka á Fornagørðum í Klaksvík.

Talan er um 21 myndir og málningar, sum Jógvan hevur gjørt. Somuleiðis luttaka Hans Hansen, Páll Purkhús, Jóngerð Purkhús og Jakob Jóhannsson Purkhús á framsýningini við vatnlitsmyndum, oljumálningum og akrylmyndum.

Jógvan Purkhús sigur sjálvur, at tá hann sum smádrongur sá myndir eftir Hans Hansen og Fritjof Joensen, vaktu tær hugin og ansin hjá honum.

– Teir vóru so gløggir og nærlagdir í sínum arbeiði, og tað vakti hjá mær ein longsul eftir at skapa nakað og at eiga eina slíka hegnishond, sum teir áttu, sigur Jógvan Purkhús.



## Deyði eydnubollans

Kristeligt Dagblad skrivar 28. mars, at málið kann verða eitt vápn í stríðnum móti tunglyndi. Saman við fleiri øðrum donskum bløðum hevur KD gjørt av, at gevast at nýta heitið eydnubolli fyri heilivág móti tunglyndi. Í framtíðini fara bløðini at skifta orðið "eydnubolli" út við "depressionsbolli". Sambært heimsheilsustovninum, WHO, er tunglyndi væl á veg at gerast ein "global epidemi". WHO metir, at tað júst nú, globalt sæð, ganga minst 120 milliónir deprimeraði menniskju runt í heiminum, og at umleið 1 millón av teimum, fer at velja sjálvmorð sum loysn uppá sínar trupulleikar.

**rs**

## Náttarbeiði styttir lívið

Náttararbeiði styttir um lívið, skrivar Tanja Parker Astrup í Politikken 28. mars. Arbeiði um náttina og ov lítil svøvnur er skaðiligt fyri heilsuna. Hetta vísir millum aðrar ein kanning, ið er gjørd á Karolina Instituttinum í Svøríki. Serstakliga eru tað kvinnurnar, ið eru í vandabólki fyri at doyggja ov tíðliga. Granskarar vita ikki, hví kvinnur tola verri náttararbeiði enn menn.

**rs**

## Heimakjekk av bróstum dugir ikki

Nógvar kvinnur kanna sjálvar bróstini fyri knyklar. Men tað minkar ikki um møguleikan at fáa bróstkrabba, vísir ein kanning, sum er gjørd av 100.000 russiskum kvinnum í árunum, 1985-2003. Hetta stendur at lesa í grein í Politikken 13. mars. Høvuðsorsøkin er, at nógv teir flestu knyklarnir eru ov smáir til, at tú sjálv kann varnast teir og harvið kanst koma nóg tíðliga í viðgerð.

**rs**